# Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# SAAB 92 RETROBILUR

Spyker Cars í Hollandi, sum eiga svensku Saab bilverksmiðjuna, hava ætlanir um framleiðslu av eini modernaðari útgávua av Saab 92, sum vórðu gjørdir frá 1949 til 1955. Talan verður um ein sonevndan retrobil við designi, sum líkist gamla Saab 92.
Søgan um Saab byrjar í 1937, tá felagið Svenska Aeroplan Aktiebolaget, ið bleiv stytt til Saab, varð stovnað í 1937 í Trollhättan til framleiðslu av hernaðarflogførum. Í desember 1949 byrjaði framleiðslan av bilum, tá Saab 92 við 2 syl. 2-takt motori, verða settir í framleiðslu. Í 1955 kom Saab 93 á marknaðin og síðan komu Saab 95 og Saab 96.




*Konseptbilurin líkist mest hesum Saab 96*




*Saab 92 konseptbilur við retrodesigni*

# Kone elevatorar í 100 ár

Í ár eru 100 ár liðin síðan finska elevatorfyritøkan Kone varð stovnað í 1910.

Kone er ein av størstu fyritøkum av sínum slagi í heiminum. Umframt lyftur framleiðir Kone eisini rullitrappur og automatiskar hurðar og portur.

Í Føroyum er tað Tórleiv Clementsen í Hósvík, sum er servicemaður hjá Kone A/S. Tórleiv, sum hevur verið servicemaður síðan 2003, er fyrsti fastbúgvandi servicemaður hjá Kone í Føroyum.

Kone A/S servicerar umleið 180 elevatorar í Føroyum.




*Á myndini eru Ole Sørensen frá Kone A/S í Danmark og Tórleiv Clementsen servicemaður í Føroyum framman fyri Landssjukrahúsið, sum hevur fleiri Kone elevatorar*

Mynd: Jens Kristian Vang